# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Í kjarnorkumálinum fer iranska fólkið ikki at bakka ein tumma fyri teimum kúgandi maktunum*

*Mahmoud Ahmadinejad*




*Flogfarið hjá Barrack Obama kom til Berlin fyrrapartin*

*Mynd: Polfoto*

# Obama ein Berliner

**Barrack Obama fer í kvøld at halda røðu í Berlin. Væntandi fara ein millión fólk at lurta eftir honum**

Fyrr hava amerikonsku forsetarnir John F. Kennedy og Ronald Reagan hildið røðu í týska høvuðsstaðnum. Kennedy framman fyri Schøneberg Rathaus í 1963, tá hann helt sína kendu røðu við orðunum „Ich bin ein Berliner", og Ronald Reagan í 1987 við Brandenburger Tor.

Í kvøld sleppa berlinbúgvar at lurta eftir demokratiska forsetavalevninum Barrack Obama, sum fer at halda røðu framman fyri Sigurssúluni.

Tíðindastovurnar skriva, at Berlin er á gosi, og summi vænta, at fleiri hundraðtúsund fólk fara at lurta eftir Obama. Tað ger ikki áhugan minni, at mong samanbera Obama við júst John F. Kennedy.

Trygdartiltøkini eru sera umfatandi í Berlin í dag. Eitt nú eru allar gøtur kring Sigurssúluna stongdar fyri allari ferðslu, og løgreglufólk eru á varðhaldi allastaðni. Áðrenn hann kom tilm Berlin, hevði Obama verið í Bretlandi, Fraklandi, Miðeystri og í Afghanistan.

# Russland eigur ikki at flyta bumbuflogfør til Kuba

**-Tað er at fara yvir um markið, um Russland ger álvara av at lata bumbuflogfør hava støð í Kuba, sigur ein amerikanskur generalur**

Russar hótta ní við senda eina deild av sínum bumbuflogførum til Kuba og at lata deildina hava støð har. Stigið er svar upp amerikonsku ætlaninar at seta eina rakettverjustøð í Eysturevropa.

Russiska blaðið Isvestija visti fyrr í vikuni at siga, at talan er um bumbuflogfør, sum kunnu flúgva langt, og sum kunnu løðast við kjarnorkuvápnum. Sambært blaðnum bar tað ikki til at fáa at vita, um ætlanin hjá russum er, at bumbuflogførini skulu verða verandi í Kuba.

Russiska hugskotið hevur sum vera man vakt ans í USA, og Norman Schwartz, generalur, hevur gjørt vart við, hvat amerikonsku myndugleikarnir halda um russisku ætlanina.

- Gera teir álvara av hesum, haldi eg, at vit eiga at seta hart ímóti høðrum og vísa teimum, at teir eru farnir yvir um okkara reyðu striku, sigur generalurin. Ein talsmaðu hjá Hvítu Húsunum var eisini rættiliga greiður:

- Soleiðis sum støðan er, er eitt tílíkt stig púra óhugsandi og ikki annað enn tankar, segði talsmaðurin.

## Kreppa fyrr

USA og Russland hava fleiri ferðir verið á rokinum orsakað av Kuba. Tann ringasta kreppan var í 1962, tá tað var um reppið, at USA og Sovjetsamveldið endaðu í kjarnorkukríggi orsakað av sovjetskum ætlanum um at seta rakettir upp í Kuba.

Í 1979 komu amerikanararnir eftir, at tvær deildir av sovjetskum jagaraflogførum vóru í Kuba, men aftan á nógv kjak valæði táverandi amerikanski forsetin, Jimmy Carter, at lata málið fara aftur við borðinum.



*Norman Schwartz, generalur, ávarar Russland*

*Mynd: Polfoto*

## STUTT SAGT

### Iran slakar ikki

Meðan alheimurin bíðar eftir, hvussu Iran fer at svara kravinum, sum varð lagt fyri iranska høvuðssamráðingarmannin í Genéve seinasta vikuskiftið, ger iranski forsetin, Mahmoud Ahmadinejad, greitt, at Iran fer ikki at slaka so mikið sum ein tumma í málinum um ta umstríddu kjarnorkuverkætlanina. Ahmadinejad segði í einari røðu í gjár, at tað iranska fólkið fer ikki at taka eitt fet eftir hæli undan teimum kúgandi maktunum, sum hann tók til. Iranska stýrið skal svara ST-kravinum innan fjúrtan dagar. ST hevur kravt, at Iran skal steðga øllum ætlanum um at ríka uran, sum kann brúkast til at gera kjarnorkuvápn við.



*Mahmoud Ahmadinejad er forseti í Iran*

*Mynd: AP*

### Rætt at bumba

Demokratiska forsetavalevnið í USA, Barrack Obama, heldur, at Ísrael hevði rætt til at bumba nakrar bygningar í Sýrialandi, tí sýrar vóru í ferð við at byggja sær eina kjarnorkustøð har. Á vitjanini í Miðeystri nú um dagarnar segði Obama við CBS-sjónvarpið, at eftir hansara tykki hevði Ísrael nóg góð prógv fyri, at sýrar veruliga vóru í ferð við at byggja sær eina kjarnorkustøð eftir norðurkoreanskari fyrimynd.

Tað var í septembur í fjør, at ísraelsk flogfør bumbaðu nakrar bygningar í Al-Kibar í Sýrialandi við teirri grundgeving, at sýrar vóru í ferð við at byggja eina kjarnorkustøð har. Tað hava sýrar avsannað.



*Barrack Obama stuðlar Ísrael*

*Mynd: Polfoto*